LM-001/2020

## Annika Petersen

**Fra:** Fía Petersen <fia@javni.fo>
**Sendt:** 10. juli 2020 13:39
**Til:** VMR-Journal
**Emne:** Hoyringssvar
**Vedhæftede filer:** 2020 Uppskot til løgtingsloǵ um broyting í løgtingsloǵ um val til allar føroyskar kommunur og íløgtingsloǵ um val til Løgtingið - hoyringssvar fráJavna.pdf; PastedGraphic-1.tiff

Viðheft er hoyringssvar frá Javna í sambandi við uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunuval og løgtingsval.

Vinarlig heilsan / Best regards

Fía Petersen
Dagligur leiðari
Tel.. +298 514827
www.javni.fo
fia@javni.fo

Hoydalsvegur 42
Postrúm 1133
FO 110 Tórshavn
Tel. +298 208090

Tórshavn, 10. juli 2020

## Hoyringssvar frá Javna

**Løgtingsmál nr. xx/202x: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur og í løgtingslóg um val til Løgtingið**

Javni takkar fyri høvið at gera viðmerkingar.

Vit fegnast um uppskotið um, at persónur, sum er undir verjumáli og hevur fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6, skal fáa valrætt og valbæri til kommunuval. Vit heittu tíðliga í 2019 á MEGD um at gera føroysku myndugleikarnar varar við hetta, tí ójavnin rakar fleiri av málbólkunum, ið eru limir í MEGD. Vit síggja tað sum ein demokratiskur trupulleiki, at øll ikki hava valrætt, hóast tey ikki megna nøkur viðurskifti sjálvi. Í Danmark hava tey fyri ikki so langari tíð síðan broytt sínar mannagongdir, soleiðis at borgarar undir §6 verjumáli nú hava valrætt. Hetta var eitt av kritikkpunktunum hjá ST nevndini til Danmark, sum er tikið til eftirtektar. Vit vóna, at føroyskir myndugleikar gera tað sama.

Lógarbroytingin um valrætt og valbari fevnir bert um kommunuval, og krevur tað broytingar í Stýrisskipanarlógini, um hetta eisini skal verða galdandi fyri val til Løgtingið, sum vit halda er sjálvsagt. Vit vænta og vóna tí, at hetta verður broytt í Stýrisskipanarlógini skjótast gjørligt.

Vit fegnast eisini um uppskotið um, at veljarin kann krevja, at annar av tveimum persónum, sum veitir hjálp við atkvøðugreiðsluni, kann vera ein, sum veljarin sjálvur vísir á. Sum nú er kunnu fólk, ið hava ørvísi mátar at samskifta uppá koma í tí støðu, at tey verða møtt á valstaðnum av hjálparfólki, ið ikki hava førleika at hjálpa teimum at greiða atkvøðu. Einasta undantak er, um tú ert blindur ella sjónveikur. Tí kann veljari koma út fyri at tey, ið skulu hjálpa honum at greiða atkvøðu, ikki skilja hansara samskiftisháttt, og tí ikki fáa hjálpt.

At útihýsa nøkrum frá at velja er ikki í trá við ST sáttmálan, sum júst snýr seg um at øll skulu hava somu rættindi í samfelagnum. Sáttmálin ásetur, at vit skulu gera rímiligar tillagingar har tað er neyðugt, til tess at tryggja fólki, ið bera brek øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi javnbjóðis øðrum.

**Javni tekur undir við lógaruppskotinum.**

Vegna Javna

Fía Petersen

dagligur leiðari/forkvinna

Javni - Hoydalsvegur 42 - Tórshavn - Tlf.: 208090 - javni@javni.fo